VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Lot til andøvsgul av suðri, seinnapartin minni vindur. Regn eitt skifti, annars sirm ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og stundum sirm ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av landsynningi, sunnudagin minni vindur av eystri. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 9 og 13 stig.

Meira enn hálva milliard í halli

Sp/F 14, sum er felagið, sum átti Tórshavnar Skipasmiðju, hevði eitt risa hall í fjør. Undirskotið var 527 milliónir krónur, og eginpeningur felagsins er nú bert 31 milliónir

VINNULÍV
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Gunnar Mohr, stjóri í føroyska íløgufelagnum Sp/f 14

Í 2007 var Sp/F 14 størsta føroyska partafelag, um hugt var eftir eginpeninginum, sum tá var 559 milliónir krónur. Nú er hann tódnaður niður á 31 milliónir.

Felagið sigur í tíðindaskrivi, at gjaldførið er gott, eginpeningurin er á haldgóðum støði, og støðan í Sp/f 14 er sum heild nøktandi, hóast ársroknskapurin fyri 2008 vísir eitt hall á 527 mió. kr. Kurstap eru orsøk til stóran part av hallinum, men felagið roknar við at vinna ein part av tapinum inn aftur sum frálíður

- Felagið hevur seinnu árini vunnið nógvan pening, og nú hevur felagið mist nógvan pening. Soleiðis eru korini á einum marknaði, sum at kalla hevur verið í undantaksstøðu. Mest týðandi er, at eginpeningurin er á haldgóðum støði, gjaldførið er gott, og at vit uttan trupulleikar svara hvørjum sítt. Virksemið heldur fram, og vit hava rímiliga góðar vónir til framtíðina.

Hetta sigur Gunnar Mohr, stjóri í føroyska íløgufelagnum Sp/f 14, í sambandi við, at ársroknskapurin fyri 2008 er góðkendur á aðalfundi felagsins.

Í stuttum vísir roknskapurin eitt hall á 527 mió. kr. Av tí, at Sp/f 14 fæst við íløguvirksemi, stavar hallið fyri stóran part frá kurstapum av virðisbrøvum. Meginparturin, stívliga 330 mió. kr., eru tó ikki-staðfest kurstap, ið felagið kann vinna inn aftur sum frálíður.

- Árið 2008 var ómetaliga turbulent fyri tey, sum virkað innan íløguvirksemi. Í so máta slapp heldur ikki Sp/f 14 undan, sigur Gunnar Mohr.

Stjórin undirstrikar tó, at eginpeningurin er á haldgóðum støði, stívliga 31 mió. kr. Harumframt er gjaldførið gott og raksturin í tryggari legu.

- Vit kunnu ikki annað enn fegnast um, at vit hava positivan eginpening og nøktandi gjaldføri í ringastu kreppu í nýggjari tíð, sigur Gunnar Mohr.

Sp/f 14 hevur í mong ár verið virkið í føroyskum vinnulívi, og seinnu árini eru íløgur m.a. gjørdar í børsskrásettar fyritøkur. Virðisbrævamarknaðirnir eru hart raktir av heimsfevnandi fíggjar- og búskaparkreppuni, ið rakar føroyska marknaðin sera meint.

- Fyritøkurnar, sum Sp/f 14 hevur gjørt íløgur í, eru grundleggjandi sunnar. Samstundis vita vit, at fíggjar- og búskaparkreppan er ikki ein áhaldandi støða. Tí rokna vit við, at virðið á okkara íløgum fer at vaksa frameftir. Har eru góðir vakstrarmøguleikar, og sum íleggjarar skulu vit geva tol, sigur Gunnar Mohr, stjóri í Sp/f 14.

Fáir partaeigarar eru í Sp/f 14. Tó hevur almennur áhugi verið fyri felagnum seinasta árið, og tí hevur felagið valt at almannakunngera høvuðstættirnar í roknskapinum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	8
Qaqortoq	11
Ammassalik	6
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	13
Seyðisfjørður	12
Tórshavn	15
Lerwick	18
Aberdeen	18
London	26
Tromsø	--
Bergen	24
Oslo	--
Stokkhólm	27
Keypmannah.	22
Helsinki	25
Moskva	19
Berlin	19
Warzawa	24
Kiev	27
Bukarest	24
Paris	25
Madrid	29
Róm	25
Malorca	26
Athen	28
Malta	26
Tunis	31
Beijing	34
New Dehli	37
Bangkok	31
Jakarta	31
Sydney	18
New York	25
Miami	30
Los Angeles	19
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	13
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	12

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nátt:
Eitt hátrýst, 1023 hPa. yvir Norðsjónum stendur mestsum í stað. Eitt lágtrýst, 1015 hPa. yvir Írska Havinum fer í útnyrðing.

Komandi nátt:
Lágtrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani til havið í útsynning úr Føroyum kemur hendavegin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 29/06 kl. 06⁰⁰ – 30/06 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,8°
Minsti hiti máldur í juni: -8,7° - Mesti hiti máldur í juni: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 29/06 kl. 06⁰⁰ – 30/06 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juni: 10 mm

Forelskað?

Vís tað í Sosialinum

VESTFALLSKYRRINDI

29. juni Fyrra tendring
4. juli Jørðin longst frá sólini
7. juli Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
30. juni	01:39	14:15	00:39	13:15	00:54	13:30	03:39	16:15	04:39	17:15	-	12:30	11:30	-	01:54	14:30	02:54	15:30	01:24	14:00	02:39	15:15
1. juli	02:51	15:14	01:51	14:14	02:06	14:29	04:51	17:14	05:51	18:14	01:06	13:29	00:06	12:29	03:06	15:29	04:06	16:29	02:36	14:59	03:51	16:14
2. juli	03:37	16:00	02:37	15:00	02:52	15:15	05:37	18:00	06:37	19:00	01:52	14:15	00:52	13:15	03:52	16:15	04:52	17:15	03:22	15:45	04:37	17:00
3. juli	04:24	16:49	03:24	15:49	03:39	16:04	06:24	18:49	07:24	19:49	02:39	15:04	01:39	14:04	04:39	17:04	05:39	18:04	04:09	16:34	05:24	17:49
4. juli	05:14	17:39	04:14	16:39	04:29	16:54	07:14	19:39	08:14	20:39	03:29	15:54	02:29	14:54	05:29	17:54	06:29	18:54	04:59	17:24	06:14	18:39

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo